


**Nr. 13** ***19. juni 2022*** **82. árg.**

# Kalla á meg, tann dag tú ert í neyð

*(Sálm. 50,15).*

Ein prestur, sum arbeiddi í Berlinar-býar-missiónini, tosaði nakað síðani við eina konu, sum onkur hevði tikið við til eitt tjaldmøti.

„Vilja tygum ikki eisini geva Frelsaranum lív tygara?" spurdi hann. Hon svaraði: „Mær nýtist ongan frelsara. Eg havi tað gott. Eg eri ógvuliga væl fyri fíggjarliga, og eg veit satt at siga ikki, hvat ið eg skuldi gjørt við ein Kristus," segði hon.

Men nakrar vikur seinni fekk prestur bræv frá somu konu. Brævið ljóðaði nakað soleiðis: „Góði prestur! Eg havi givið meg yvir til Frelsaran við likami og sál. Tí eg havi sanniliga upplivað, at Jesus livir!"

So greiðir hon frá einari hending. Hon skuldi inn á eina verksmiðju og læt eina tunga hurð upp og fór inn. Hurðin smekkaði í, og kring hana var bølamyrkt. Hon var av misgáum komin inn í rúmið, har lyftan plagdi at koyra upp og niður. Hon ætlaði sær at finna handtakið og trilvaði runt allastaðni, men tað var ógjørligt at finna tað. Tá ið eyguni høvdu vant seg við myrkrið, sá hon høgt uppi yvir sær lyftina.

Ein ræðuligur ótti kom á hana. Hon slerdi inn á hurðina, og hon skríggjaði alla tíðina. Men eingin hjálp kom. Hvat nú, um lyftan kom niður. Tá fór hon miskunnarleyst at knasa hana! Á – nei – jú! Lyftan fór í gongd og kom sanniliga niðureftir móti henni. Nærri og nærri. Nú kundi hon nema við hana við hondunum.

Tá blakaði hon seg skerflata niður og skríggjaði úr sínum hjartadýpi í deyðaræðslu: „Harri Jesus! Um tú livir, hjálp

mær so.“ Hvat hendi? Lyftan steðgaði brádliga, 30 cm uppi yvir gólvinum, beint uppi yvir høvur hennara. Elstreymurin var avbrotin. Høvdu einglahendur brotið streymin av? Hon skríggjaði og gnísti. Nú hoyrdu tey hana, og endiliga togaðu tey hana fram undan lyftini. Men straks, hon var bjargað, fall lyftan niður á botn við einum braki. Hon hevði kroyst hana til deyðis beinanvegin, um hon enn hevði ligið har. Hon skilti Guds talu. Og uttan at drála gav hon lív sítt yvir til hansara, sum hevði varðveitt hana á so undurfullan hátt, og sum hon hevði rópt á í hesari óhugnaligu slokuni, har lyftan plagdi at fara upp og niður.

*Richard Schmitz. – Effie Campbell* umsetti.

# Bíblian

Corrie ten Boom skrivar um Bíbliuna: „Á øllum mínum ferðum, eisini nú, tá ið eg eri yvir 80 ár, havi eg Bíbliuna við mær – í hondini og í hjartanum. Hon er lívsins orð og so **kjokkfull av góðum tíðindum**. Og í henni hevur altíð verið nóg mikið fyri ein og hvønn. Ofta kenni eg tað soleiðis, sum lærusveinarnir munnu hava kent tað, tá ið teir mettaðu meir enn fimm túsund við fimm breyðum og tveimum smáfiskum. Loyndarmálið var, at teir høvdu tikið ímóti tí úr Meistarans signaðu hondum. Har var nóg mikið til øll, ja, enntá tólv fullar kurvar av restum.

Tá ið eg var í New Zealandi, búði eg hjá einum húski, sum lærdi seg bíbilorð uttanat eftir „Navigatør-systemet“. Tá gjørdi eg av, at eg eisini skuldi fara at terpa skriftstøð. Eg visti, at tá ið Guds orð fyrst var goymt í hjarta mínum, so hevði eg tað har fyri tíðir og ævir.

Einaferð, tá ið eg skuldi inn í Eystur-Berlin, kom ein offiserur at kanna meg.

„Lesa tygum viðhvørt í Bíbliuni?“ spurdi eg offiserin.

„Nei, eg eri marxistur!“ svaraði hann treiskur.

„Bíblian varð skrivað serliga til marxistar,“ segði eg. „Hon sigur, at Gud elskaði marxistarnar so høgt, at hann gav son sín, hin einborna, fyri at ein og hvør marxistur, sum trýr á hann, ikki skal doyggja, men hava ævigt lív.“

Ja, mannaættin hevur tvey stór vandamál at dragast við: synd og deyða; men Bíblian gevur okkum svar upp á hesi vandamálini við at siga okkum frá Jesusi.

Mong menniskju gera tað mistakið, at tey halda, at tey kunnu máta sína frelsuvissu við sínum egnu kenslum. Men tað er Guds orð, sum er grundarlagið. Tí er týdningarmikið fyri hin nýumvenda at hava praktiskan kunnleika til Bíbliuna. Hin nýumvendi er eisini meir enn nakar annar í skotlinju fíggindans. Tí treingir hann til Andans svørð, so hann kann verja seg móti øllum álopum.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Bróðir Adrians

Adrian Johansen, trúboðari av Strondum, skrivar: „Eg hevði ein beiggja, ið æt Jóhan, sum doyði av lungnabruna, tá hann var 13 ára gamal.

Tað var tann seinasta morgunin, hann livdi her á jørð, mamma sat í stovuni saman við honum, og meðan hann liggur í songini, so sigur hann: „Mamma, nú hoyri eg allar klokkurnar ringja í himli, hoyrir tú tær, mamma?“ Men mamma hoyrdi ikki klokkurnar.

Eina løtu seinni segði hann aftur: „Mamma, nú eru allar ljósakrónurnar í himlinum tendraðar. Sært tú ikki ljósini, mamma?“

Eina stutta løtu seinni sló hann armarnar út og segði: „Mamma, nú tók Jesus meg.“ So var hann ikki meira okkara millum.

Eg veit ikki, hvussu tað fer at gangast tær, og hvussu tað fer at gangast mær. Eg havi síðani tá kent meg nær knýttan at Harranum Jesusi, og tað var orsøkin til, at eg kom til umvendingar og til trúnna á Hann. Ikki bara eg, men fjøldin av okkara familju, og eg má siga tað soleiðis, eg havi inniliga ynskt mær, uttan mun til hvat mær var fyri í lívinum, at Jesus ongantíð mátti fara burtur úr eygsjón míni, men einaferð koma til mín, sum tá hann kom til beiggja mín, og siga: „Vælkomin heim, Adrian!“

# Konan, sum ongantíð hevði syndað

Ein ensk kona, sum búði í Suðurafrika, bjóðaði einum hvítum trúboðara at koma og vitja seg, og skjótt sótu tær og prátaðu dúgliga.

Konan var púra vís í, at hon slapp inn í Himmalin, tí hon hevði onga synd og hevði altíð livað eitt vakurt lív og gjørt alt tað góða, hon kundi, og meir kundi Gud ikki krevja av henni.

„Ja, tað er bara frálíkt, at tygum hava so góðar vónir um at sleppa inn í Himmalin, tí eitt menniskja, sum ongantíð hevur syndað, kemur so víst har; men so eru tygum eitt undantak, tí Gud sigur í orði sínum, at øll hava syndað, og vegurin inn í Himmalin er Jesus, og á tí vegnum eru tygum jú ikki. Hann kom at frelsa syndarar, ikki tey rættvísu, so tygum hava ongan lut í frelsuni gjøgnum deyða hansara á krossinum fyri okkara skuld. Bíblian sigur okkum ikki frá nøkrum øðrum vegi," segði trúboðarin.

Konan stardi bilsin at henni, tá ið hon helt á at tosa um, hvat ið Jesus hevur gjørt fyri okkum, men sum ikki kundi galda fyri hana, og at enda gekk boðskapurin inn í hjarta hennara, og hon bleiv púra sundurknúst. Hon segði: „Jú, jú, eg eri eisini ein syndari, og eg vil blíva frelst gjøgnum Jesus einsamallan."

Tað endaði við, at tær fullu á knæ saman, og hon fekk frið við krossins fót.

*„Kirkeklokken"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Áðrenn tey rópa

Ein smádrongur stóð og hugdi at nøkrum arbeiðsmonnum, sum fyri fyrstu ferð settu ein telegrafleidning upp í Hetlandi. Ein prátingarsamur maður segði við drongin: „Heldur tú ikki, at hetta er ein løgin uppfinning? Tá ið leidningurin verður liðugur, kunnu fólk senda eini boð frá sær meir enn 50 míl og fáa svar um ein tíma."

„Jú, men tað er ikki so ræðuliga løgið," segði drongurin.

„Íðan, veitst tú um okkurt, sum er enn óførari?"

„Ja, tað veit eg."

„Hvat skuldi tað verið, um eg tori at spyrja?" segði maðurin.

„Hevur tú ongantíð hoyrt, at vit kunnu fáa svar, áðrenn vit spyrja?" segði drongurin.

„Hvat meinar tú?"

„Jú, eg hugsi um orðið: „Áður enn teir hava kallað, man eg svara, bønhoyra teir, áður enn orðið er talað," svaraði drongurin. (Jes. 65,24).

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19. juni | **Tekstur:** | Jóh. 8,2-11 + 6,37b | **Bíbliuorð:** | Dán. 9,9a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 14** ***3. juli 2022*** **82. árg.**

# Dreymurin

*„Tí at hann skoðar til endamark jarðar,*
*alt undir himni sær hann.“ Job 28,24.*

Ein maður talaði í Meinigheitshúsinum. Millum annað greiddi hann frá einum stykki, sum hann fyri mongum, mongum árum síðani hevði lisið í Dansk Missionsblad. Hóast hesi mongu ár mintist hann stykkið niður í smálutirnar, av tí at tað hevði havt sovorðna ávirkan á hann.

Stykkið var um ein mann, sum hevði ein dreym. Vit droyma ofta, og tá ið vit so vakna, siga vit: „Hatta var bara ein dreymur!“ Men tað kann bera á, at tá ið vit vakna, vita vit við vissu, at hesa ferð var tað meir enn bara ein dreymur.

Maðurin, sum skrivaði í Dansk Missionsblad greiðir nøkulunda soleiðis frá:

„Eg droymi, at eg fari oman til bakaran at keypa rundstykkir. Á veg til hús møti eg Jesusi, sum sigur, at hann kemur at vitja meg í dag. Tá ið vit koma inn til okkara, bjóði eg Jesusi tann besta sessin í húsinum, og vit sessast kring morgunborðið at fáa okkum rundstykkir og kaffi. Tað, sum eg serliga hefti meg við, var, at eingin talar orðið. Har var tøgn, og ein undurfullur, vælsignaður friður valdaði. Friður er av sonnum ein trotvøra í dag – orð, orð og aftur orð floyma ímóti okkum dagin langan. Útvarp og sjónvarp standa frá, og sangur og tónleikur sjangra út í rúmið. Jú, larm og ófrið hava vit ov mikið av.

At enda sigi eg: „Jesus, nú noyðist eg at fara til arbeiðis. Set tú teg nú og hvíl teg og kenn teg sum heima. Tá ið eg komi aftur í kvøld, skulu vit báðir hugna okkum og hava eitt gott kvøld saman.“

Men Jesus segði, at hann kom við mær til arbeiðis. Tá ið vit koma inn á arbeiðsplássið, bjóði eg Jesusi ein góðan sess at seta seg á; men hann sigur, at hann vil sita beint innan fyri dyrnar á einum krakki.

Skjótt kemur tann fyrsti kundin. Hann tosar hart og er stórorðaður. „Nú skalt tú bara hoyra. Eg havi funnið uppá nakrar snildir, nøkur fín lokabrøgd, sum vit báðir kunnu vinna nógvan pening burturúr. Og so fór hann við keipum og stórum orðum at greiða frá sínum svikaráðum.

Maðurin varð meir og meir illa við, tí Jesus sat har og hoyrdi alt. At enda rendi maðurin kundan á dyr. „Hvat bagir tær, tú plagar ikki at vera so, ert tú blivin heilagur?“ rópti hann uppøstur, í tí hann fór út gjøgnum dyrnar.

So kom næsti kundi. Hesin maðurin hevði so ræðuliga skitnan munn. Eiðirnir floymdu frá honum, og prátið var rátt og sjendskt. Maðurin mátti eisini renna hann út, og kundin rópti forhánisliga, um maðurin nú var vorðin heilagur.

Tá ið kvøldið kom, fór maðurin yvir til Jesusar og segði: „Harri, tað var óheppið, at tú skuldi koma í dag og uppliva alt hetta.“

„Eg eri jú hjá tær hvønn einasta dag, 24 tímar um døgnið. Eg hoyri og síggi alt, sum tú sigur og gert,“ svaraði Jesus.

Og so vaknaði maðurin. Tað er ikki ov nógv sagt, at hann var skelkaður. Sjálvandi visti hann, at Jesus altíð er hjá okkum og hoyrir og sær alt. Tað hevði hann jú lisið í Bíbliuni; men henda vitan hevði ikki rættiliga trongt seg inn í heilan, so hann hugsaði um, hvat ið hon innibar.

Nú hevði hann upplivað Jesu vitjan, og hann ynskti ikki aftur at standa so skammfuktaður. Hvussu er tað við mær og tær? Hugsa vit um hin ósjónliga gestin, ið gongur okkum við lið?

*Effie Campbell.*

# Eitt lív uttan Gud er tómleiki

Jesus livir. Í Matt. 28,5 lesa vit: „Men eingilin tók til máls og segði við kvinnurnar: „Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita. Hann er ikki her, tí at hann er risin upp!“

Mín kunnleiki um Gud var, at eg visti, at hann var til; men eg hevði ongantíð møtt Jesusi. Eg hevði ongantíð upplivað

eitt livandi persónligt samfelag við Gud og son hansara, Jesus Kristus.

„Men hetta er tað æviga lívið, at teir kenna teg, hin eina, sanna Gud, og tann, sum tú sendi, Jesus Kristus.“ Jóh. 17,3.

„Og sí, Jesus kom ímóti teimum.“ Matt. 28,9.

Fyri 13 árum síðani kom Jesus ímóti mær. Í langa tíð hevði eg gingið við einum tómleika innan í mær og einari sorg um lívið. Eg íðkaði ítrótt og útilív (sparkaði fótbólt, veiddi, fiskaði). Alt tað ytra var í lagi. Men meiningin við lívinum var burtur. Tað mátti vera okkurt meir enn hetta! At liva eitt stutt lív og doyggja, og so er alt liðugt, tað er tómleiki. 2. Kor. 7,10 sigur: „Tí at sorgin eftir Guds sinnalagi virkar umvending til frelsu, sum eingin iðrar seg um; men sorg heimsins virkar deyða.“

Tað ytra var í lagi, men tómleikin í mínum innara menniskja var stórur. Eg var keddur, okkurt vantaði í, eg visti ikki rættiliga, hvat ið tað var. Eg fann eitt Nýggja Testamenti og fór at lesa. Eg kendi á mær, at tað hevði okkurt við Bíbliuna at gera; men eg visti ikki heilt hvat. Eg leitaði eftir onkrum; men eg visti ikki rættiliga, hvørjum ið eg leitaði eftir. Mær tørvaði okkurt; men eg visti ikki, hvat ið mær tørvaði.

So ein morgun fyri 13 árum síðani fór eg av songini. Eg fór inn í køkin og víðari inn í stovuna. Tá kendi eg, at okkurt serligt var til staðar. Tárini fóru at renna, og ein ósigandi innari gleði fylti meg. Eg fór at takka Gudi, at hann var Faðir mín. Jesus var bjargingarmaður mín. Jesus var komin at fylla tómleikan og meiningsloysi, sum eg hevði kent innan í mær. Gud talaði við meg og segði, at hann elskaði meg. Guds kærleiki fylti hjarta mítt. Róm. 5,5. Eg visti ikki, at Gud elskaði menniskjuni so persónligt. Alt í einum sá eg, hvat ið mær hevði fattast, og hvat ið lívið er.

„Jesus er vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við honum.“ Jóh. 14,6. Dagin eftir upplivdi eg næstan hitt sama. Jesus talaði til mín, at hann elskaði meg, at hann altíð elskar meg, og at vit skulu liva saman í allar ævir. Jóh. 3,16. Og kærleiki Guds streymaði aftur inn í hjarta mítt.

Triðja dagin var eg í biografi og sá filmin um Jesus, sum doyði á krossinum fyri meg. Tá ið eg setti meg í bilin at koyra heim, fleyt hjartað yvir í takksemi til Jesus, sum gav lív sítt fyri meg. Eg mátti steðga bilinum og fara út. Tað var, sum var

bilurin ov trongur. Eg mátti út í tað fría rúmið at prísa og takka Jesusi, av tí at hann elskaði meg so høgt.

Hesir tríggir ógloymandi dagarnir fyri 13 árum síðani góvu lívi mínum nýggja meining og nýggja kós. Mítt takksemi fer til Gud, mín Faðir og til Jesus, sum doyði á krossinum og reis upp úr grøvini fyri meg og fyri teg.

*Fred Myrbostad, Bygdene for Kristus.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Gud er almáttugur

Ísraelskir granskarar eru komnir fram á undurfullar veruleikar Skriftini viðvíkjandi. Her er eitt dømi:

Eftir jødiskum siði eru fleiri tøl heilag tøl, millum onnur talið 50. Hvørt hálvtrýssinstjúgunda ár var fagnaðarár í Ísrael. Granskarar lótu tí datatólið printa út hvønn 50. bókstav í øllum fimm Mósebókunum. Teir fingu eina langa avskrift, sum sá soleiðis út: TORATORATORATORATORA … o.s.fr.

Tað hendir seg ikki, at eitt sovorðið einsháttað bókstavarað kundi komið av tilvild. Tá ið vit so harafturat síggja at hetta serliga orðið, sum kemur aftur og aftur, er orðið TORA, tá standa vit framman fyri einum guddómligum fyribrigdi. Tí TORA er nevniliga tað hebráiska navnið á Mósebókunum – Guds lóg!!!

Granskarar gjørdu fleiri sovorðnar avskriftir, sum vóru bygdar á onnur heilag tøl í Bíbliuni, og hvørja ferð fingu teir eina líknandi ófatiliga avskrift.

Eitt er vist: Bíblian er Guds orð! Høvuðsboðskapurin í henni er: „Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.“ 1. Jóh. 1,9. Um tú setir títt álit á Jesus Kristus sum Frelsara, vil hann ongantíð svíkja teg. Hann fer ongantíð at sleppa tær upp á fjall.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74